# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Maktstríð

Tað maktstríð, ið nú er brostið á millum løgmann og tingformann, tykist at vera ein fylgja av okkara stýrisskipanarlóg. Stýrisskipanarlógin setir vatntætt skott millum lóggávuvald og útinnandi vald. Hetta merkir, at landsstýrið og løgtingið at kalla einki kunnu útinna í felag, og hetta merkir aftur, at skipanin hevur innbygt spíran til maktstríð. Tað er valla nakað fólkaræði í heiminum, ið hevur eina so fundamentalistiska stýrisskipan, og valla nakað fólkaræði er skipað við vatntøttum skottum millum lóggávuting og stjórn. Tey, ið á sinni gjørdu okkara stýrisskipanarlóg, tykjast at hava fingið Montesqieu í rangastrúpan.

Tá ein skipan er so fýrkantað sum okkara, kemur tað fyrr ella seinni til stríð millum tingformann og stjórnarleiðara. Nú er hetta stríð so brotið út í ljósum loga, og valskipanin gjørdist fjúsið, ið fekk tað at bresta. Eingin kann forða einum tingformanni at leggja eitt uppskot um broyting í valskipanini fyri tingið. Tað er heldur einki, ið kann forða løgmanni at royna at halda samgonguni saman, og í hesum sambandi kann løgmaður ikki lastast fyri at gera seg inn á fólkaræðið. Víst ger tingið, sum tað vil, men tað tykist sum onkur gloymir, at fólkaræði fyrst og fremst er dialogur. Um tann, ið situr við hægsta demokratiska embæti, nevniliga tingformaðurin, handlar uttan fyrilit fyri sínum samgongupartnarum, so má hetta skapa órógv í skipanini. Um løgmaður í síni roynd at bjarga samstarvinum og halda samgonguni saman, ger hetta á ein hátt, ið tingformaðurin kann tulka sum uppílegging í tingsins myndugleika, so hava vit ikki bert ein trupulleika, men eina demokratiska kreppu.

Í fólkaræðiligari politiskari skipan eru tær óskrivaðu spælireglurnar mangan eins týðandi sum tær skrivaðu. Hetta merkir ma., at partarnir eiga at tala saman og halda samskiftinum á einum sømiligum og ábyrgdarfullum støði. Tað er sjálvsagt bæði gott og rætt, at partarnir alment skifta orð um eitt so stórt mál, men tað er ikki minni týðandi, at partarnir seta seg við samráðingarborðið. Tað er við samráðingarborðið, at fólkaræðið virkar í praksis. Gloyma partarnir dialogin, fara fólkaræðiligu tilgongdirnar í baklás, og tað er júst tað, sum nú er hent. Nógv týðandi mál standa í hálvum gekki. Kemur valið nú, kunnu ganga ár, áðrenn tey verða loyst. Hinvegin er støðan í samgongu so læst, at løgmaður tykist bert hava tann eina valkostin: at skriva út nýval. Sum gongdin hevur útviklað seg, má sigast, at hetta mál er ikki nóg væl handfarið, og taparin er demokratiið. Vit hava fyrr talað fyri endurskoðan av stýrisskipanarlógini, ið hevur meir enn 10 ár á baki og kom í gildi, meðan núverandi tingformaður var løgmaður. Har eru ymsir vansar, og nú er tíð at enduskoða. Hetta eigur eisini at vera sæð í ljósinum av arbeiðinum við einari stjórnskipanarlóg, ið varð byrjað undir seinastu samgongu, og álit varð handað í hesi.

**Sosialurin**

## Soleiðis er nýggja Dimma



**STEINTÓR RASMUSSEN**
Summarfestivalurin

Ein góð forsíða selur bløð, men ikki altíð sannleikar.

Dimmarlætting hevur skjótt met í at bera óalítandi festivaltíðindi.

Um ætlanin við aktuellu søgunum er at lokka fólk á festival ella at ræða fólk burtur frá tiltøkunum kann gløggi lesarin meta um.

Úr rúgvuni kann nevnast Carola á G!, Prodigy á G!, Alt ov fáir vaktir á Summarfestivalinum og Eingin trygdarætlan á Summarfestivalinum.

Men nú er blaðstjórin sjálvur farin at undirgrava feitu yvirskiftirnar í blaðnum. Mánadagin 6. august stóð á forsíðuni á Dimmalætting, at 10.000 rokkaðu við Scorpions. Tríggjar vikur seinni sigur Árni Gregersen við Portalin, at tað ber ikki til at fyriskipa einum tiltaki fyri 12.000 fólk, uttan trygdin er í lagi?!

Trygdin skal verða í lagi, óansæð hvat tiltak talan er um, og hvussu nógv menniskju eru tilstaðar.

Og vit skulu eisini kenna okkum trygg við blaðskrivingina í nýggju Dimmu!

At vit komu okkara festivalgestum í vandastøðu, tiltikna leygardagin í august, er harmuligt og eisini nívandi fyri Summarfestivalin. Ein góður uggi er, at vit í illveðrinum tóku nakrar rættar avgerðir og sluppu undan fólkaskaða. Tey flestu mundu fáa dyggan skelk hendan dagin, og illa var, um Summarfestivalurin ikki lærdi av hendingini og tók ávaringina í størsta álvara við sær í framtíðina.

Summarfestivalurin hevur frá fyrstan tíð havt eitt gott samstarv við allar avvarðandi myndugleikar í Norðoyggjum.

Øll okkara tilbúgving er í neyvum samskifti við løgregluna, bæði í praksis og á pappírinum.

Í einari undantaksstøðu sleppur styrkin frá einum óræddum og royndum bjargingarliði, meira enn nakar manualur, at standa sína roynd. Møguliga varð tann ringasta vanlukkan av somu orsøk fyribyrgd?!

At okkara trygdarætlan byggir á ta samlaða orkuna í býnum, átti ikki at undrað nakran. Í Klaksvík er trygdarmiðstøð, bjargingarlið, sløkkiliðsmenn, politistøð og sjúkrahús. Í miðbýnum eru stórir bygningar og útgerð, sum skapa eyka tryggleika og styrki. Um festivalurin varð hildin í Svínoy ella á Viðareiði, langt frá allari almennari tilbúgving, so vildi støðan verið væl torførari og í nógvum førum meira hættisligt.

Tað er gott, at Dimmalætting varpar ljós á trygdina, har stór tiltøk skulu haldast. Vit hava lært av hendingini og vóna, at fleiri við okkum hava tað sama.

Takk fyri upptøkuna. Og hjartans takk fyri dygga hjálp tá harðast leikaði á.

## Sláið nú kalt vatn í blóðið



**JÓANNES EIDESGAARD**
løgmaður

Eg havi síðan henda samgonga tók við fyri hálvum fjórða ári síðani lagt stóran dent á arbeiðsfrið og gott samgongustev. Og júst hetta hevur verið okkara vørumerki. Men tíverri má eg beint nú ásanna, at hetta als ikki er støðan við nógvu útmeldingunum um val í úrtíð og hóttanum um uppsøgn av samgonguni.

Hetta klæðir okkum ikki sum ábyrgdafullir politikkarar, og hetta er als ikki gagnligt fyri samfelagið sum heild - so vælsignaði, sláið nú kalt vatn í blóðið.

Eg havi saman við Jørgen Niclasen, Kaj Leo Johannesen og Kristian Magnussen gjørt avtalu um, at vit vilja virka fyri, at eitt broytingaruppskot til uppskotið hjá Edmund Joensen um Føroyar sum eitt valdømi verður gjørt. Hetta skal gera, at uppskotið um Føroyar sum eitt valdømi fyrst kemur í gildi eftir komandi løgtingsval. Harumframt hava vit eisini avtalað, at vit vilja virka fyri, at galdandi vallóg verður broytt soleiðis, at tingmannatalið til komandi løgtingsval verður økt úr 32 upp í 33, og at hetta eina mandatið kemur Suðurstreymoy til góðar, og somuleiðis at tíðin frá tí, at valið verður útskrivað til valið skal vera, verður stytt úr seks niður í tríggjar vikur.

Latið hesa semju nú koma til eina roynd í løgtinginum. Hetta eiga bæði nei-síðan eins væl og ja-síðan at kunna liva við.

Samgongan hevur enn mong týdningarmikil mál at fremja, so vit mugu hava arbeiðsfrið restina av valskeiðnum. Her hugsi eg serliga um Fíggjarlóg fyri 2008, Eftirlønarskipanina og Bústaðarpakkan, men eisini eina røð av øðrum málum.

Vit hava snøgt sagt ikki brúk fyri panikk-útmeldingum um val í úrtíð ella hóttanir um slit av samgonguni. Latið okkum heldur seta fokus á nógvu góðu málini, vit enn skulu røkka, áðrenn vit enda henda túrin og fara at gera klárt til næsta túr.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.